# Bátafelag og bátafestivalur á Toftum

**Nýggja felagið hevur longu avgjørt, at bátafestivalur verður á Toftum, 7. mai í ár við ymiskum tiltøkum til undirhalds, eitt nú dansi, matsølu og ymiskum framsýningum**

BÁTAFELAG

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnudagin var stovnandi aðalfundur av einum bátafelag á Toftum.

Fundurin varð hildin í hølum hjá eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum.

Til fundin høvdu stigtakararnir fingið loyvi at brúka reglugerðina hjá Bátafelagnum í Havn.

Símun Johannesen, borgarstjóri, varð valdur til fundarstjóra og las hann reglugerðina hjá felagnum í Havn upp fyri fundarfólkinum.



*Nevndin í Bátafelagnum á Toftum, fv.: Snorri Jensen, Høgni W. Høgnesen, Rúni Hansen, Hans Óli V. Andreassen (tiltakslimur), Tórunn F. Gaardbo og Høgni Hansen. Regin Debes, sum eisini er tiltakslimur í nevndini, vantar á myndini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Navn og búmerki

Høgni W. Høgnesen er ein av stigtakarunum til felagið, og á fundinum greiddi hann frá, hvussu hann hugsaði sær, at felagið kundi tænt sínum endamáli.

Einir 15 mans og ein kvinna møttu til fundin, har ein 5-mannanevnd við tveimum tiltakslimum varð vald. Tey, sum komu í nevndina, vóru: Høgni W. Høgnesen, Rúni Hansen, Snorri Jensen, Tórunn F. Gaardbo og Høgni Hansen. Tiltakslimir vórðu valdir Regin Debes og Hans Óli V. Andreasen. Nevndin skipar seg sjálv.

Á fundinum varð Petur Thomsen valdur til grannskoðara, og samtykt varð eisini, at limagjaldið verður 100 krónur um árið.

Bátafelagið á Toftum skal nú hava eitt navn, og á fundinum skeyt onkur upp at fáa felagnum eitt búmerki.

Felagið er fyri allar bátaeigarar og øll, sum hava áhuga fyri bátum, bátasøgu og sigling.

## Bátafestivalur

Á stovnandi fundinum á Toftum upplýsti stigtakarin, at nýggja felagið fer at skipa fyri einum bátafestivali á Toftum, 7. mai, har allir bátaeigarar og onnur eru vælkomin at verða við.

Á fundinum komu fleiri hugskot fram um, hvussu skráin fyri ein slíkan dag kundi sæð út, men hetta verður so eitt arbeiði, ið nevndin, sum nú er vald at stíla fyri felagnum, í fyrsta lagi kemur at arbeiða víðari við.

Ætlanin er at hava ymiskt tiltøk á havnalagnum á Toftum hendan dagin og um kvøldið, eitt nú við dansi, matsølu og framsýningum av ymiskum slagi.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu endaliga skráin kemur at síggja út, men hugskotini vóru fleiri, og tí er væntandi, at tey, sum gera sær ein túr út á Toftir, 7. mai – í báti ella í bili - ikki fara avstað aftur uttan at hava havt eitt minniligt upplivilsi.

# Fólk í Nes kommunu stovna stuðulsfelag

**- Ætlanin er at stovna eitt stuðulsfelag, sum skal taka sær av ymiskum stuðulstiltøkum til frama fyri B68, sigur Maihard Fróði Højgaard, sum er primus-motor til stovnan av felagnum**

STUÐULSFELAG

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 19 verður fundur í B68-húsinum á Svangaskarði, har eitt stuðulsfelag verður stovnað.

Mainhard Fróði Højgaard, sum er ein av stigtakarunum til felagið, sigur, at felagið ætlandi skal taka sær av ymiskum stuðulstiltøkum til frama fyri B68.

Men hóast felagið enn ikki er stovnað, hava Mainhard Fróði og onnur longu skipað fyri fyrsta tiltakinum, sum var eitt tombola-tiltak á Torginum í SMS í Havn fyri fyri umleið einum mánaða síðan.

Mainhard Fróði sigur seg vera væl nøgdan við hetta fyrsta tiltakið, sum gav fitt av peningi, og hann fer saman við øðrum av fullum huga undir at skipa eitt stuðulsfelag til frama fyri B68.

## Skava og vinn

Sum skilst, fer næsta tiltakið skjótt av bakkastokki. Tað verður eitt "skava og vinn" tiltak, sum er um at verða undir landi.

Mainhard Fróði sigur, at seðlarnir fara til prentingar fyrsta dagin, og síðan hava teir onkur viðurskifti at avgreiða við Toll og Skatt, áðrenn sølan av "skava og vinn" kann byrja. Hann sigur, at eitt annað tiltak, sum eisini partvís er farið av bakkastokki, er ein single-fløga við B68-sangum.

- Fyrsta lagið komu longu fyri B68-veitsluna í heyst. Lagið ber heitið, "Rómur yvir Svangaskarð" og er væl móttikið av B68-viðhaldsfólk.

## Fýra B68 løg

Hann sigur, at tónleikarin, Kim Hansen, hevur skrivað lagið til sangin, og Jóannes Jacobsen hevur skrivað orðini.

- Ætlandi verða fýra løg á single-fløguni. Hetta er eitt kostnaðarmikið tiltak, men vit ætla, at alt skal verða goldið, áðrenn fløgan endaliga kemur út, sigur Mainhard Fróði Højgaard sum vónar, at fundurin á Svangaskarði í kvøld verður væl møttur.

# Karlstadmodellið letur dyr upp

**Týskvøldið 15. mars fer Jóhanna Andreasen at halda fyrilestur á Klaksvíkar Bókasavni um sonevnda Karlstad modellið, ið verður nýtt til at læra børn við Downs syndrom at samskifta**

FYRILESTUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Jóhanna Andreasen hevur sjálv góðar royndir við hesum háttinum, sum hon venur sonin, sum hevur Downs syndrom, við. Eftir at hava undirvíst sonin heima í nøkur ár, er Jóhanna sannførd um, at tað ber til at náa úrslitum, vit ofta ikki halda bera til, tá tað ræður um børn við Downs Syndromi. Tú skalt bara vera fyrireikaður uppá, at tað tekur tíð.

Endamálið við Karlstad modellinum er at læra barnið at samskifta, men eftirhondini sum barnið lærir fleiri orð og tekin, er tað ongin ivi um, at sjalvsvirðingin eisini veksur, sum eisini er við til at skapa betri trivna sum heild.

## Tað ber til

Gamlir fordómar eru ofta høvuðsorsøkin til, at ikki verður gjørt meir fyri at læra menningartarnað at samskifta á jøvnum føti við onnur. Tað eru nevniliga framvegis nógv, ið hava hug at spyrja, hvat tað nyttar at læra til dømis børn við Downs Syndromi at lesa og skriva. Tey læra tað jú kortini ongantíð.

Men royndirnar hjá Jóhonnu og øðrum við Karlstad modellinum hava prógvað, at tað ber til, og at tað ikki er nakað loft fyri, hvussu nógv orð og tekin tey kunnu læra. Og tað er als ongin ivi um, at Karlstad modellið í aðrar mátar kann vera við til at lata dyr upp á tann hátt, at barnið kemur at kenna seg sum ein livandi part av sínum umhvørvið og ikki uttanfyri.

Fyrilesturin hjá Jóhonnu um Karlstad modellið er liður í økisfundunum hjá Javna, sum verða hildnir kring alt landið undir felags heitinum "Tú kanst – bara tú fært møguleikan". Fundirnir hava til endamál at

Lýsa møguleikarnar hjá fólki við menningartarni

Lýsa møguleikarnar hjá avvarandi at børnum og ungum við menningartarni

Lýsa hvørjar møguleikar fólk við breki ynskja stóð teimum í boði

Læra okkum at síggja møguleikar og at brúka teir.

Javni vónar, at tey, ið kunnu viðvirka til at geva teimum menningartarnaðu møguleikarnar, koma við á fundirnar. Her hugsa tey um lærarar, pedagogar, stuðlar, øll innanheilsuverkið umframt politikarar.

Annars eru øll vælkomin á fundirnar, sum eru skipaðir við fyrilestri, kjaki og spurningum.

Á fundinum, sum verður á Klaksvíkar Bókasavni týskvøldið 15. mars kl. 19, fer ein dramabólkur frá Verkstaðnum á Brekku eisini at framføra ein leik.